# Sjón: *Skugga-Baldur* (2003)



Permumyndin

**Málbólkur:** Føroyskt á 2. ella 3. ári á A-stigi

**Tíð:** 4-7 blokkar á 90 min.

**Næmingafortreytir:** Næmingarnir duga grundleggjandi tekstgreining og eru kunnigir við ymisk tekstsløg.

**Tilfar:** Arbeitt verður við verkinum *Skugga-Baldur* (2003) eftir Sjón (uml. 120 s.).[1] Harafturat eru leinki til annað tilfar.

**Arbeiðshættir:** Floksundirvísing, bólkaarbeiði og einstaklingaarbeiði. Arbeiðið er skipað í tríggjar partar: ÁÐRENN tey lesa verkið, MEÐAN tey viðgera verkið, og AFTANÁ at tey hava viðgjørt verkið.

ÁÐRENN: Arbeitt verður við bakstøðistilfari í bólkum, og byrjað verður at lesa verkið.

MEÐAN: Verkið verður viðgjørt í bólkum.

AFTANÁ: Verkið verður sett í frásjón.

[1] Sjón (Sigurjón Birgir Sigurðsson) fekk í 2005 bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri bókina *Skugga-Baldur*. Bókin kom út á føroyskum í 2006. Jákup í Skemmuni týddi, og forlagið Nýlendi gav út. Forlagið Sprotin endurútgav týðingina hjá Jákupi í Skemmuni í 2012. Í hesari seinnu útgávuni er sermerkta uppsetingin av tekstinum ikki varðveitt. Útgávan frá 2006 er útseld, men er tøk sum flokssett í Námi. Útgávan frá 2012 fæst til keyps í bókhandlunum. Bókin er eisini tøk sum ljóðbók.

NÁM

**ÁÐRENN (1-2 blokkar)**

Lesið hvør sær heima viðtalið "Därför förstär jag Homeros" eftir Soffíu Auður Birgisdóttur úr *Nordisk Tidskrift* 3/2005.[2]

Bólkakjak. Tit skulu í smáum bólkum gjøgnumganga viðtalið og skifta orð um innihaldið.

Síðan byrja tit at lesa bókina *Skugga-Baldur* í flokkinum, og lesa so restina hvør sær heima. Í flokkinum kunnu tit antin lesa hvør sær ella saman í smáum bólkum. Meðan tit lesa, skulu tit skugga ella leggja serligt merki til ávísan persón ella viðurskifti. Skrivið stikkorð og finnið nøkur áhugaverd sitat.

Persónar/viðurskifti at skugga:

- Fríðrikur B. Friðjónsson
- Baldur Skuggason
- Revtíkin
- Ævintýreyðkenni
- Bygging
- Samfelagsviðurskifti

---

**MEÐAN (2-3 blokkar)**

Bólkaarbeiði. Hvør bólkur arbeiðir við eini av uppgávunum niðanfyri og leggur fram fyri flokkinum. Framløgutilfarið skal verða tøkt hjá øllum næmingunum.

Uppgávurnar eru ymiskar í vavi. Fyri at allir næmingarnir skulu fáa hóskandi avbjóðing, ber sjálvandi til at tillaga uppgávurnar eftir bólkunum við t.d. at leggja summar av uppgávunum saman, koyra aðrar í tvey ella leggja okkurt afturat ella burturúr.

**Uppgáva 1) Ævintýreyðkenni**

Hví hevur høvundurin valt at geva bókini undirheitið *Eitt fólkaævintýr*? Lýsið og vísið á dømi um ævintýreyðkenni (tit kunnu lesa um ævintýreyðkenni í *Sýni & Dýpi 1*).

**Uppgáva 2) Bygging og frásagnarviðurskifti**

Lýsið frásøgufólkið og søgubygnaðin. Hvat verður lýst í hvørjum broti? Og hvussu eru brotini samansett? Metið eisini um, hví søgan er soleiðis uppbygd, og hvussu tílík bygging ávirkar lesaran. Grundgevið við dømum úr søguni.

**Uppgáva 3) Fríðrikur B. Friðjónsson**

Gerið eina gjølliga persónlýsing av Fríðriki B. Friðjónssyni. Hvønn leiklut hevur hann? Og hvussu broytist hann gjøgnum søguna? Hvørja fatan fær lesarin av honum? Grundgevið við dømum úr søguni.

---

[2] Viðtalið er á svenskum. Er tað ov trupult at lesa, ber til at brúka týðaraforrit, t.d. Google Translate, og týða til eitt nú danskt ella enskt.

**Uppgáva 4) Baldur Skuggason**

Gerið eina gjølliga persónlýsing av Balduri Skuggasyni. Hvønn leiklut hevur hann? Og hvussu skal tað skiljast, at hann verður til ein rev seinast í søguni? Hvørja fatan fær lesarin av honum? Grundgevið við dømum úr søguni.

**Uppgáva 5) Myndamál**

Viðgerið nýtslu av myndamáli sum heild í søguni. Leggið tó dent á revtíkina og lýsið hana gjølla. Metið um, hvussu myndamálið ávirkar frásøgnina og lesaran. Grundgevið við dømum úr søguni.

---

**AFTANÁ (1-2 blokkar)**

Ymsar uppgávur at arbeiða við í felag ella í smáum bólkum, sum so leggja fram fyri flokkinum.

**Uppgáva 1) Kirkjugarðar**

Lesið greinina "Millum fjøllini í Norðradali vil eg hava mítt seinasta hvíldarstað" (1934) eftir Andrias í Norðradali úr *Sýni & Dýpi 2* og samanberið við s. 78-85 í bókini *Skugga-Baldur* (útgávan frá 2006). Hvønn hugburð hava tekstirnir til jarðarferðir og gravstaðir?

**Uppgáva 2) Downs syndrom**

Leitið tykkum vitan um Downs syndrom, t.d. á Wikipedia. Samanberið hugburðin til Downs syndrom í dag við hugburðin á s. 71-74 í bókini *Skugga-Baldur* (útgávan frá 2006).

**Uppgáva 3) Franskir yrkjarar**

Í bókini *Skugga-Baldur* verða nakrir franskir yrkjarar nevndir: Baudelaire, de Nerval, Gautier og de Musset (s. 68 í útgávuni frá 2006) og Mallarmé (s. 122 í útgávuni frá 2006). Leitið tykkum vitan um hesar yrkjararnar og metið um, hvønn týdning teir hava havt fyri Fríðrik B. Friðjónsson.